Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 9. februar 2024

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan

Føroya Lærarafelag hevur fingið uppskot til broyting í § 20 í løgtingslóg um fólkaskúlalóg til hoyringar, áseting um næmingatal í hvørjum flokki.

Nevnd felagsins hevur á fundi viðgjørt uppskotið og hevur felagið hesar viðmerkingar, at felagið tekur undir við eini lógaráseting, at tað í mesta lagi kunnu vera 20 næmingar í hvørjum flokki, men felagið tekur ikki undir við uppskotinum, sum tað er orðað.

Felagið fer at mæla til, at § 20 fær hesa orðing:

"§ 20. Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið ikki at fara upp um 20 í hvørjum flokkinum."

Í uppskotinum, sum felagið hevur fingið til hoyringar stendur, at "Er næmingatalið í flokkinum hægri enn 20 við skúlaársbyrjan, kann skúlaleiðarin avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk.". Vit koma at viðmerkja ein og ein part av hesum uppskoti.

Fólkaskúlaálitið mælir til at "økja um læraratíðina til hvønn einstakan næming".

At minka um hægsta næmingatal í hvørjum flokki er í samsvari við fólkaskúlaálitið frá 2023, har mælt verður til at gera átøk í skúlanum, so at "skúlarnir fáa størri rásarúm at økja um læraratíðina til hvønn einstakan næming og kunnu fáa fleiri lærarakreftir inn í hvønn flokk". Mælt verður eisini til "at broyta skipanina, har hámarkið fyri næmingatalinum í flokkunum verður lækkað".

Um floksstødd verður víðari mælt til: "Tað er ein fortreyt fyri at náa tí einstaka, at menna læringina og felagsskapin í flokkinum, at flokkarnir ikki eru ov stórir, og at eyka læraratímar eru í flokkunum eftir tørvi. Sjálvt um flokkar eru ymiskir, so er tað eisini í teimum vælvirkandi flokkunum torført hjá einum lærara við 23-26 næmingum at náa øllum næmingunum, ikki bara fakliga, men eisini við atliti at trivnaði og felagsskapi, tí tað er ov lítil tíð til hvønn einstakan. Hetta eru viðurskifti, sum eigur at verða bøtt um, so skjótt sum til ber við at lækka floksstøddina til 20-22 næmingar. Hetta kann ikki verða gjørt í einum, men byrjað eigur at verða við innskúlingini."

At § 20 verður broytt, soleiðis at floksstøddin við skúlaársbyrjan verður í tráð við námsfrøðiliga gransking, har 20 næmingar í flokkunum er best hóskandi fortreyt fyri námsfrøðiliga, trivnaðarliga og fakliga menning.

Myndugleikin, sum játtar, ræður fram um skúlastjóran:

Felagið fer staðiliga at mæla frá orðingini, at tað verður latið skúlaleiðarum at avgera at býta flokkin í tveir flokkar ella seta aðra fyriskipan í verk, tí at skúlaleiðarin hevur ongan møguleika, uttan at hann hevur neyðugu játtanina frá játtanarmyndugleikanum at býta flokkin.

Tað eru nýggj dømi um, at skúlastjórin ikki fekk býtt flokkar sundur, tí at skúlin ikki hevði neyðugu játtanina til at gera tað. Skúlaárið 2023/24 vóru 52 næmingar innskrivaðir í 8. flokk í Fuglafjarðar skúla. Skúlastjórin ynskti at býta næmingarnar í tríggjar flokkar, við 17, 17 og 18 næmingum í hvørjum flokki, men tað lat seg ikki gera, tí skúlin hevði bert fingið játtan til tveir flokkar við 26 næmingum í hvørjum. Hetta er eitt týðiligt dømi um, at tað er myndugleikin, sum játtar, sum ræður, sjálvt um skúlastjórin hevði eitt ynski um at býta flokkin sundur, so var tað játtanin sum var avgerðandi. Sama støða hevur verið í 1. flokki á Skúlatrøð og í 8. flokki í Runavíkar Kommunuskúla.

Ásetingin um at “seta aðra fyriskipan í verk”:

Í broytingaruppskotinum verður heimild givin til skúlaleiðaran at velja ímillum antin at býta flokkin í tveir flokkar við 21. næmingin, ella seta inn við aðrari skipan, t.d. tvílæraraskipan, sum skal tryggja nøktandi undirvísingartíð til tann einstaka næmingin. Í hesum sambandi verður eisini nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, “at tað neyðturviliga ikki skal vera talan um tvílæraraskipan, men at tað eisini kann hugsast, at skúlaleiðarin velur at seta inn á annan hátt, eitt nú við at seta ein námsfrøðing inn í flokkin.”

Hetta er ikki í samsvari við fólkaskúlaálitið, sum mælir til at minka um floksstøddina, ella at seta inn við eini víðkaðari tvílæraraskipan. Felagið var umboðað í bólkinum, ið evnaði fólkaskúlaálitið til, og vit kenna okkum als ikki aftur í uppskotinum sum fyriliggur, at skúlaleiðarin skal hava heimild til at meta um, hvørt ein flokkur við 21 næmingum ella fleiri skal býtast í tveir flokkar, ella um ein námsfrøðingur skal setast í flokkin. Hetta var als ikki til umrøðu, og um so var, so er tað okkara greiða fatan, at undirtøka ikki hevði verið fyri hesum.

Felagið er av tí greiðu fatan, at hetta eisini er í stríð við fólkaskúlalógina. Sambært § 35, stk. 1, í fólkaskúlalógini er ásett: ”Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Lærараskúla, Fróðskaparsetri Føroya ella donskum lærараskúla sbr. stk. 2-5 ella aðra lærараútbúgving á sama støði, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent.” Hetta merkir, at tað bert eru útbúnir fólkaskúlalærarar, sum kunnu røkja uppgávuna at undirvísa í fólkaskúlanum. Tí er eingin heimild til at seta ein námsfrøðing í flokkin til vanligu undirvísingina í staðin fyri ein lærara, sum skal undirvísa flokkinum.

Tað er í stríð við fólkaskúlalógina, at lógaruppskotið gevur skúlaleiðaranum valið millum at býta flokkin í tveir flokkar ella at seta ein námsfrøðiligan stuðul inn í flokkin, um talið av næmingum er 21 ella fleiri, tá hetta bara er grundað á næmingatalið í flokkinum.

Vit vilja vísa á, at námsfrøðingar kunnu bert setast í starv í fólkaskúlanum at veita næmingum sernámsfrøðiligan stuðul, so sum at "venja í virkisháttum" og "at veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa næminginum í gerandisdegnum í sambandi við skúlagongdina"; hetta er ásett í kunngerð um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul.

Í § 14 er ásett, at "Lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk, og námsfrøðingar kunnu røkja sernámsfrøðiligar stuðulsuppgávur sbrt. § 1."

Um ein næmingur hevur tørv á serundirvísing og sernámsfrøðiligum átøkum, so er víðari ásett í § 1, at hetta:

"§ 1 Serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk fata um nr. 1, 2 og 3, og sernámsfrøðiligur stuðul fatar um nr. 4 og 5.

1) at skipa skúlagongdina og undirvísingina við atliti at fortreytum hjá einstaka næminginum.

2) at leggja til rættis serligt undirvísingarligt tilfar og tøknilig amboð, sum eru neyðug fyri læring, menning og virkisførleika hjá einstaka næminginum.

3) at skipa og undirvísa í virkisháttum og arbeiðsháttum, sum hava til endamáls at menna virkisførið hjá einstaka næminginum.

4) at venja í virkisháttum og arbeiðsháttum, sum hava til endamáls at menna virkisførið hjá einstaka næminginum.

5) at veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa næminginum í gerandisdegnum í sambandi við skúlagongdina."

Í kunngerðini er eisini ásett í §14, at "Lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk, og námsfrøðingar kunnu røkja sernámsfrøðiligar stuðulsuppgávur sbrt. § 1". Tað vil siga, at lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk. Skúlin kann bara seta námsfrøðingar at taka sær av uppgávum sum sernámsfrøðiligur stuðul, sum lýst í punkt 4) og 5). "4) at venja í virkisháttum og arbeiðsháttum, sum hava til endamáls at menna virkisførið hjá einstaka næminginum," og "5) at veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa næminginum í gerandisdegnum í sambandi við skúlagongdina."

Tað er ongin ivi í lógini og í kunngerðini um, at námsfrøðingar einans kunnu verða settir sum stuðlar hjá tí einstaka næminginum, og kunnu ikki setast í starv í staðin fyri ein lærara í flokkinum. Tað framgongur somuleiðis av § 14 í kunngerðini, at lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk, og námsfrøðingar bara kunnu røkja sernámsfrøðiligar stuðulsuppgávur sbrt. § 1.

Í øllum hesum førunum, tá ein námsfrøðingur verður settur í starv í skúlanum, er talan um serligan tørv hjá tí einstaka næminginum og ikki sum ein fyriskipan, sum kann setast í verk til allan flokkin, grundað á næmingatalið í flokkinum.

Viðmerkingar til galdandi løgtingslóg um floksstødd:

Í galdandi løgtingslóg um fólkaskúlan, stendur í § 20, "at við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum".

Í viðmerkingunum til hesa grein stendur:

"Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið tey 7 fyrstu skúlaárini vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum".

Tey seinastu árini hevur "vanliga 24" flutt seg til "vanliga 26". Hetta framgongur eisini av lógaruppskotinum, har tað stendur, at "í galdandi játtanarskipan verður játtað til tveir flokkar við 27'inda næminginum."

Í viðmerkingum til § 20 í verandi lóg stendur: "Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið tey 7 fyrstu skúlaárini vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokkinum. Her er ásett eitt slag av hámarki fyri floksdeildtali, sum í roynd og veru bert er viðkomandi fyri teir umleið 20 størstu (ársbýttu) fólkaskúlarnar í landinum. Sambært verandi siðvenja hava teir umleið 40 smærru fólkaskúlarnir, ið hava 2 og fleiri árgangir í sama flokki, at kalla ongantíð 24 næmingar í flokkinum - uttan í onkrum samlestrartíma. Trupulleikin er tí tann, at eingin regla finnst fyri flokkatalinum í hesum skúlum. Ráðleggingarnevndin er tí samd um, at tað av námsfrøðiligum, fyrisitingarligum og fíggjarligum orsøkum er neyðugt at hava eina fyrisitingarliga meginreglu at halda seg til, tá ið støða verður tikin til flokkatal skúlans. Ein týdningarmikil táttur í so máta er at fyrisita soleiðis, at tað altíð er eitt hóskandi samsvar millum flokkatal skúlans og næmingatalið. Samsvarandi hesum vil nevndin mæla til, at ásett verða almenn stevnumið fyri flokkatali skúlanna, og at tann einstaki skúlin verður býttur sundur í flokkar eftir teimum meginreglum, ið her eru skotnar upp.

Tað skal viðmerkjast, at tað flokkabýtið, her er skotið upp, samsvarar við tað, sum stendur í galdandi áliti "Fólkaskúlin - Tíma- og lærugreinabýti" 1993, s. 31, og sum Landsskúlafyrisitingin fyrisitur eftir. 4. stk.: Sjálvt um nevndin er samd um at áseta meginreglur fyri flokkatali skúlanna, so er hon tó greið um, at tað kunnu vera ymisk viðurskifti sum t.d.ójavnir árgangir, hølisviðurskifti o.a., ið kunnu volda, at tað ikki altíð ber til at leggja flokkar saman, so at næmingatal og flokkatal

skúlans er samsvarandi hesi ásettu meginreglu. Tí verður mælt til, at landsstýrismanninum skal vera heimilað í serstøkum føri at kunna víkja frá meginregluni um flokkatal."

Felagið ásannar, at tað kunnu verða viðurskifti, sum til dømis hølisumstøður ella aðrar líknandi praktiskar forðingar sum gera, at tað ikki ber til at býta ein flokk í tveir sjálvstøðugar flokkar. Í slíkum førum ber til, at tveir flokkar brúka sama høli, men at játtað verður ein lærari til hvønn flokkin. Felagið vil eisini vísa á, at tað eru viðurskifti, ið tala fyri, at tað ikki eiga at vera 24 næmingar í einum flokshøli, men nakað færri enn tað, tí at hølisviðurskiftini eru ikki egnað til 24 næmingar, t.d. tí hølið er ov lítið ella luftútskiftingin er ov vánalig til so nógvar næmingar.

Felagið fer at mæla til, at § 20 fær hesa orðing:

§ 20. Við skúlaárs byrjan eigur næmingatalið ikki at fara upp um 20 í hvørjum flokkinum.

Við at strikað orðið "vanliga" er ongin ivi um, at játtast skulu læraratímar til tveir flokkar, tá næmingatalið við skúlaársbyrjan er meira enn 20 næmingar. Lógin má greitt tryggja, at skúlarnir fáa játtan til tveir flokkar, tá næmingatalið í flokkinum fer upp um 20 næmingar.

Hesari tillagaðu viðmerking tekur felagið undir við og heldur, at ein skipan við hægst loyvda næmingatali til hvønn flokk og harvið til hvønn lærara fer at betra munandi um trivnaðin og fakligu menningina hjá tí einstaka næminginum.

Vinaliga

Jacob E. Ols.

Jacob Eli Olsen
formaður

Fólkaskúlaálitið: Tilmæli endalig uppseting.indd (d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net)